# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 22. februar 2019
Mál nr.: 19/00012
Málsviðgjørt: EFR
Eftirkannað: 8. februar 2019

**Løgtingsmál nr. 104/2018: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven**
(Bemyndigelse til at fastsætte integrationsrelevante krav som betingelse for tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne, hjemmel til delegation af kompetence til at træffe afgørelse om ophold på Færøerne i første instans til færøske myndigheder og ændring af klageadgang i sådanne sager til Udlændingenævnet)

## Uppskot til

## Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven**
(Bemyndigelse til at fastsætte integrationsrelevante krav som betingelse for tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne, hjemmel til delegation af kompetence til at træffe afgørelse om ophold på Færøerne i første instans til færøske myndigheder og ændring af klageadgang i sådanne sager til Udlændingenævnet)

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar niðanfyristandandi uppskot til anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om udlændingeloven.

## Forslag til

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven**
(Bemyndigelse til at fastsætte integrationsrelevante krav som betingelse for tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne, hjemmel til delegation af kompetence til at træffe afgørelse om ophold på Færøerne i første instans til færøske myndigheder og ændring af klageadgang i sådanne sager til Udlændingenævnet)

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 3[1] i  i lov nr. xxx af xx.xxxx 2019 om ændring af udlændingeloven (Bemyndigelse til at fastsætte integrationsrelevante krav som betingelse for tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne, hjemmel til delegation af kompetence til at træffe afgørelse om ophold på Færøerne i første instans til færøske myndigheder og ændring af klageadgang i sådanne sager til Udlændingenævnet), bestemmes:

**§ 1**

I udlændingeloven, som sat i kraft for Færøerne ved anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, som ændret ved § 32 i anordning nr. 704 af 29. juni 2012, anordning nr. 677 af 17. juni 2013 og anordning nr. 168 af 14. februar 2017, foretages følgende ændringer:

**1.** I *§ 9, stk. 13,* indsættes efter 3. pkt. som nyt punktum:

»Såfremt en færøsk myndighed har fået delegeret kompetencen til at træffe afgørelse i medfør af § 46 c, kan den færøske myndighed sammenholde oplysninger fra folkeregistret på Færøerne med oplysninger om boligforhold, jf. 2. pkt., med det formål at tilvejebringe oplysning om antallet af beboelsesrum i boligen og antallet af beboere, der er tilmeldt den pågældende adresse.«

**2.** I *§ 11* indsættes som *stk. 9:*

»*Stk. 9.* Udlændinge- og integrationsministeren kan efter forhandling med det færøske landsstyre fastsætte nærmere regler om, at tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne betinges af, at den pågældende udlænding har en integrationsrelevant tilknytning til Færøerne.«

**3.** Efter § 46 b indsættes:

»**§ 46 c.** Udlændinge- og integrationsministeren kan efter forhandling med Færøernes landsstyre delegere kompetencen til at træffe afgørelse i første instans i sager om ophold på Færøerne til en færøsk myndighed i følgende sager:

1) Sager om opholdstilladelse til udlændinge, som tidligere har haft dansk indfødsret, jf. § 9, stk. 1, nr. 1, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning.
2) Sager om opholdstilladelse som følge af familiemæssig tilknytning til personer bosiddende på Færøerne, jf. § 9, stk. 1, nr. 2-4, og § 9, stk. 2, nr. 1 og 4, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning.
3) Sager om opholdstilladelse som følge af beskæftigelsesmæssige eller erhvervsmæssige hensyn på Færøerne, jf. § 9, stk. 2, nr. 3, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning og lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse.
4) Sager om opholdstilladelse som religiøs forkynder, studerende eller med henblik på praktik- eller au pair-ophold, jf. § 9, stk. 2, nr. 4, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning.
5) Sager om opholdstilladelse som medfølgende familiemedlem til personer, der har fået opholdstilladelse på Færøerne som studerende eller på baggrund af beskæftigelse, jf. § 9, stk. 2, nr. 4, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning.

---

[1] Bestemmelsen er sålydende: "Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne med de ændringer, som de færøske forhold tilsiger."

*Stk. 2.* Stk. 1 omfatter desuden
1) afgørelser om afvisning af ansøgninger, jf. § 9, stk. 7, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning,
2) afgørelser om forlængelse af opholdstilladelse, jf. § 11, stk. 2, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning,
3) afgørelser om tidsubegrænset opholdstilladelse, jf. § 11, stk. 3 og 4, i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning,
4) konstatering af bortfald af opholdstilladelse og afgørelser om, at en opholdstilladelse ikke skal anses for bortfaldet, jf. §§ 17 og 18 i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning,
5) afgørelser om inddragelse af opholdstilladelse, jf. § 19 i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning,
6) afgørelser om opsættende virkning, jf. § 33 i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning, samt
7) afgørelser om identitetsfastlæggelse, fastsættelse af alder i forbindelse med en ansøgning om opholdstilladelse som følge af en familiemæssig tilknytning til en person bosiddende på Færøerne, tilbagerejsetilladelse og laissez-passer.

*Stk. 3.* Er kompetencen til at træffe afgørelse delegeret til en færøsk myndighed i medfør af stk. 1, indhenter den færøske myndighed en bindende indstilling fra Udlændingestyrelsen eller Styrelsen for International Rekruttering og Integration om, hvorvidt udlændingen er udelukket fra at opnå eller bevare opholdstilladelse på Færøerne, jf. § 10 i udlændingeloven som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning. Indstillingen, der ikke er en afgørelse, skal lægges til grund ved den færøske myndigheds afgørelse af sagen.

**§ 46 d.** Er kompetencen til at træffe afgørelse i medfør af § 46 c delegeret til en færøsk myndighed, kan den færøske myndigheds afgørelser, bortset fra de i § 33 nævnte afgørelser, påklages til Udlændingenævnet. § 52 a, § 52 b, stk. 7, og § 52 c i den for Danmark gældende udlændingelov finder tilsvarende anvendelse.

*Stk. 2.* Klage over afgørelser truffet i medfør af § 46 c skal være indgivet, inden 8 uger efter at klageren har fået meddelelse om afgørelsen. Udlændingenævnets formand eller den, formanden bemyndiger dertil, kan i særlige tilfælde beslutte, at en klage skal behandles, selv om klagen er indgivet efter udløb af fristen i 1. pkt.«

**4.** I *§ 52, stk. 2*, indsættes som *2. pkt.:*
»Såfremt en færøsk myndighed har fået delegeret kompetencen til at træffe afgørelse i første instans efter stk. 1, nr. 1 og 2, indbringes sagen for retten af den færøske myndighed, der fremsender sagens akter med oplysning om den påklagede afgørelse, en kort redegørelse for de omstændigheder, der påberåbes, samt sagens bevisligheder.«

**§ 2**

Anordningen træder i kraft dagen efter dens kundgørelse i Kunngerðablaðið.

*Givet på Christiansborg Slot, den (dato)*

Under Vor Kongelige Hånd og Segl

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Seinastu árini hevur landsstýrið saman við donsku stjórnini arbeitt við at fyrireika avgerðargrundarlagið undir yvirtøku av útlendingaøkinum og marknaeftirlitinum. Ætlan er løgd fyri yvirtøkuarbeiðið, og fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis. Tó hevur fullfíggjaða yvirtøkan av málsøkinum serliga verið tarnað av týðandi ivamálum viðvíkjandi Schengen-skyldunum hjá Danmark.

Tí hevur landsstýrið gjørt semju við donsku stjórnina um at flyta heimildirnar at taka avgerðir til føroyskar myndugleikar í teimum málum, sum hava størst týdning fyri útlendingar í Føroyum.

Hetta verður gjørt samstundis, sum tað framhaldandi verður arbeitt við at fyrireika fullfíggjaðu yvirtøkuna av málsøkinum.

Umframt at flyta umsitingarheimildirnar í ávísum útlendingamálum til Føroya, er semja um, at tíðaróavmarkað uppihald í Føroyum frameftir kann treytast av, at viðkomandi útlendingur hevur eitt málsligt tilknýti til Føroyar, ella eitt tilknýti, sum á annan hátt er viðkomandi fyri integratiónina í Føroyum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Lógarkarmurin fyri útlendingaøkið er útlendingalógin fyri Føroyar, sbr. anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden af udlændingeloven for Færøerne og lov nr. 462 af 17. juni 2008 om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse.

Galdandi lóggáva á økinum verður innihaldsliga í stóran mun tann sama eftir, at heimildirnar verða fluttar.

Almennu viðmerkingarnar til danska uppskotið lýsa galdandi lóggávu og eru hjálagdar hesum uppskoti sum fylgiskjal 2.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Landsstýrið hevur í fleiri ár samstarvað við danskar myndugleikar um at fyrireika avgerðargrundarlagið undir yvirtøku av útlendingaøkinum og marknaeftirlitinum sambært lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka.

Sambært yvirtøkulógini gera føroyskir myndugleikar av, eftir tinging við danskar myndugleikar, nær útlendingaøkið og marknaeftirlitið verða yvirtikin, sbr. § 2, stk. 2, sbr. nr. 12 í lista I í fylgiskjali lógarinnar.

Ein yvirtøka hevur m.a. við sær, at føroyskir myndugleikar fáa lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkjunum og harvið eisini umsitingarliga myndugleikan.

Ætlan er løgd fyri yvirtøkuarbeiðið, og fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis. Tó hevur fullfíggjaða yvirtøkan av málsøkinum serliga verið tarnað av týðandi ivamálum viðvíkjandi Schengen-skyldunum hjá Danmark.

Arbeitt hevur verið við at fáa greiðu á hesum viðurskiftum í samráð við ES-kommissiónina, men tilgongdin hevur higartil verið sera trupul og tíðarkrevjandi. Bæði føroyskir og danskir myndugleikar streingja tó framvegis á fyri at finna eina hóskandi loysn soleiðis, at yvirtøkan kann fremjast á nøktandi hátt. Samstundis verður ásannað, at fleiri landsstýrið ikki hava megnað at komið á mál við hesum spurninginum.

Ímeðan arbeitt verður við fullfíggjaðu yvirtøkuni av málsøkinum, hevur landsstýrið ynskt at fáa so stóra ávirkan á málsøkið sum gjørligt, við at flyta teir mest týðandi partarnar av málsøkinum til Føroya.

Úrslitið av hesum er, at semja er gjørd við donsku stjórnina um at flyta føroyskum myndugleikum heimild at taka avgerðir í fyrsta instansi í teimum málum, sum hava týdning fyri útlendingar í Føroyum.

Endamálið við at flyta avgerðarheimildirnar er eisini at styrkja førleikarnar hjá føroyskum myndugleikum á útlendingaøkinum sum fyrireiking til eina fullfíggjaða yvirtøku av málsøkinum.

Samstundis verður hildið fram at fyrireika avgerðargrundarlagið undir eini yvirtøku av málsøkinum sambært yvirtøkulógini, og arbeitt verður áhaldandi við at finna neyðugu loysnirnar viðvíkjandi Schengen-spurninginum.

*Heimildirnar at taka avgerðir fluttar føroyskum myndugleikum*
Skotið verður upp at flyta føroyskum myndugleikum heimildina at taka avgerðir í fyrsta instansi í ávísum málum um uppihald hjá útlendingum í Føroyum og harvið lata føroyskum myndugleikum umsitingarliga myndugleikan í hesum málum.

Føroyskir myndugleikar fáa við uppskotinum heimildir at taka avgerðir í

1) málum um uppihaldsloyvi til útlendingar, sum áður hava havt danskan heimarætt,
2) málum, har útlendingar søkja um uppihaldsloyvi, grundað á tilknýti til familju, undir hesum hjúnafelaga ella samlivandi (familjusamanføring),
3) málum um uppihaldsloyvi, grundað á arbeiðs- ella vinnulig atlit í Føroyum (arbeiðsmál),
4) málum um uppihaldsloyvi til útlendingar, sum kunngera ein átrúnaðarligan boðskap, lesandi, ella viðvíkjandi starvsvenjingar- ella au pair-uppihaldi í Føroyum, og
5) málum um uppihaldsloyvi sum samfylgjandi familjulimur til persónar, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum sum lesandi ella grundað á arbeiði.

Umframt omanfyrinevndu mál fara føroyskir myndguleikar at yvirtaka umsitingina av teimum málum, sum verða nevnd í § 46 c, stk. 2. Talan er um úttømandi uppreksan av teimum málum, sum føroyskir myndugleikar eftir delegatiónina fara at taka avgerð um.

Í dag eru tað *Udlændingestyrelsen* og *Styrelsen for International Rekruttering og Integratión (SIRI)*, sum taka omanfyri nevndu avgerðir.

Tá heimildirnar eru fluttar føroyskum myndugleikum, verður tað Útlendingastovan, ið verður avgerðarmyndugleiki í fyrsta instansi.

*Styrkt integratión*
Lógaruppskotið broytir ikki materiellu reglurnar fyri innferð og uppihald í Føroyum. Tí verður løgfrøðiliga grundarlagið undir málsviðgerðini í stóran mun framhaldandi tað sama.

Landsstýrið hevur tó ynskt, at integratiónin í Føroyum av nýkomnum útlendingum verður styrkt.

Tí verður skotið upp at útvega heimild at áseta nærri reglur um, at tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum er treytað av, at viðkomandi útlendingur hevur eitt málsligt tilknýti til Føroyar, ella eitt tilknýti, sum á annan hátt er viðkomandi fyri integratiónina í Føroyum. Hetta skal tryggja, at integratiónin av nýkomnum útlendingum í Føroyum verður stuðlað í útlendingalógini fyri Føroyar soleiðis, at atgongdin til at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum kann verða treytað av, at útlendingurin hevur eitt sterkt tilknýti til føroyska samfelagið. Heimildin kann nýtast í sambandi við, at landsstýrið fer at veita integratiónsfremjandi tilboð við t.d. undirvísing í føroyskum, soleiðis at vantandi luttøka í slíkum tilboði av integratiónsávum – eins og í grannalondunum – kann fáa avleiðingar fyri møguleikan at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi.

*Kærumyndugleiki*
Við uppskotinum eru tað bert heimildirnar at taka avgerðir í fyrsta instansi, sum verða fluttar føroyskum myndugleikum. Delegatiónin fevnir ikki um kærumyndugleikan, sum framhaldandi verður hjá donskum myndugleikum.

Avgerðir, sum *Udlændingestyrelsen* og *Styrelsen for International Rekruttering* hava tikið í fyrsta instansi, kunnu í dag kærast til danska ráðharran á økinum, sbr. § 46, stk. 2 í útlendingalógini fyri Føroyar.

Skotið verður upp, at reglurnar um kærumøguleika verða broyttar í sambandi við at heimildirnar at taka avgerðir verða fluttar føroyskum myndugleikum. Hetta verður gjørt soleiðis, at møguligar kærur um avgerðir hjá føroyskum myndugleikum í fyrsta instansi um at nokta umsókn um uppihald í Føroyum frameftir kunnu kærast til danska *Udlændingenævnet.*

*Upplýsingar úr Schengen-kunningarskipanini*
Føroyar eru ikki fevndar av Schengen-avtaluni og eru at rokna sum triðjaland í mun til upplýsingar úr Schengen-kunningarskipanini. Sambært Schengen-*acquisnum* kunnu danskir myndugleikar ikki lata triðjalondum upplýsingar úr Schengen-kunningarskipanini.

Hóast føroyskir myndugleikar yvirtaka avgerðarheimildirnar, so verður framhaldandi ikki gjørligt at fáa neyðugu upplýsingarnar úr Schengen-kunningarskipanini í sambandi við málsviðgerð av uppihaldsmálum.

Samstundis er neyðugt at tryggja, at uppihaldsloyvi ikki verður latið persónum, sum av ymsum ávum eru óynsktir í Schengen. Eisini er neyðugt at tryggja, at tað ikki fyriliggja umstøður, sum kunnu elva til útvísing úr Føroyum sambært ásetingunum í kapitli 4 í útlendingalógini, sum er galdandi fyri Føroyar.

Tí verður skotið upp, at føroyskir myndugleikar í sambandi við málsviðgerðina fáa til vega eitt bindandi ummæli frá donskum útlendingamyndugleikum um, hvørt ein útlendingur er útihýstur frá at kunna fáa uppihaldsloyvi í Føroyum, orsakað av upplýsingum úr Schengen-

kunningarskipanini, ella grundað á eina meting, sum er fingin til vega frá donsku fregnartænastuni.

Um tað sæst av ummælinum, at § 10 forðar fyri, at uppihaldsloyvi verður latið sambært § 9, skulu føroyskir myndugleikar nokta umsóknini um uppihaldsloyvi uttan aðra grundgeving. Útlendingurin kann tó sjálvur søkja danska útlendingamyndugleikan um partsinnlit. Verður noktandi svar upp á umsókn um uppihaldsloyvi kært til *Udlændingenævnet*, so verður útlendingurin partshoyrdur og fær partsinnlit í tey viðurskifti, sum eru grundarlag undir ummælinum sambært vanligum fyrisitingarreglum. Møguleikin fyri at fáa partsinnlit er tó avmarkaður.

Framgongur tað hinvegin av ummælinum, at § 10 ikki forðar fyri, at uppihaldsloyvi verður latið sambært § 9, ger føroyski myndugleikin eina meting av, um treytirnar fyri uppihaldi í Føroyum annars eru loknar. Í tí sambandi skulu føroyskir myndugleikar taka atlit at fyrisitingarligum reglum, men partshoyringin, sum er farin fram frammanundan, og grundgevingin fyri avgerðini, verður avmarkað til upplýsingar um, hvat innihaldið í bindandi ummælinum er. Hetta kemst av, at føroyskir myndugleikar sambært Schengen-reglunum ikki kunnu fáa upplýsingar um grundarlagið undir ummælinum.

Viðmerkjast skal, at føroyskum myndugleikum kunnugt er enn ikki komið fyri, at umsókn um uppihaldsloyvi í Føroyum er noktað, grundað á omanfyrinevndu upplýsingar úr Schengen-kunningarskipanini ella frá donsku fregnartænastuni.

Sí annars pkt. 2.2. í hjálagda uppskoti, sum lýsir skipanina við bindandi ummæli nærri. Eisini verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 3 í uppskotinum.

*Virksemið hjá Útlendingastovuni*
Útlendingastovan virkar í dag sum hoyringarmyndugleiki í sambandi við umsóknir um uppihaldsloyvi í Føroyum. Útlendingamál eru felagsmál, og eru tað *Udlændingestyrelsen* og *Styrelsen for International Rekruttering og Integration* (*SIRI*) sum taka avgerðir, tá útlendingar søkja um uppihaldsloyvi í Føroyum.

Sambært § 46, stk. 4 í útlendingalógini, sum er galdandi fyri Føroyar, kann *Udlændingestyrelsen* (í dag eisini *SIRI*) biðja landsstýrið um eitt ummæli í sambandi við viðgerð av einum máli.

Í málum, har útlendingur søkir um uppihaldsloyvi, grundað á tilknýti til familju, undir hesum hjúnafelaga ella samlivandi (familjusamanføring), biður *Udlændingestyrelsen* vanliga Útlendingastovuna um eina meting av, um bústaðarviðurskiftini hjá herbúgvandi persóni eru nøktandi, um herbúgvandi persónurin er førur fyri fíggjarliga at uppihalda umsøkjara, og um herbúgvandi persónur og umsøkjari sambært Landsfólkayvirlitinum eru skrásett á sama bústaði. Í málum um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi heitir *Udlændingestyrelsen* á Útlendingastovuna um at veita upplýsingar um, hvørt umsøkjarin hevur falna skuld til landið, og um umsøkjarin er kendur í brotsskránni, eins og *Udlændingestyrelsen* fær til vega integratiónssamrøðuna, sum løgreglan í Føroyum hevur gjørt.

Í málum um arbeiðsloyvi (arbeiðsmál) biður *SIRI* vanliga Útlendingastovuna um eina meting av, um føroysk arbeiðsmegi er tøk til tað starvið, sum søkt verður um, hvørt umsøkjari er skikkaður til starvið, og um setanarviðurskiftini eru í samsvari við føroysk lønar- og setanarviðurskifti. Tá søkt verður um framleingjan av arbeiðsloyvi kannar Útlendingastovan, um umsøkjari í seinasta loyvistíðarskeiði hevur havt eina inntøku, sum samsvarar við ta løn, ið umsøkjarin hevur fingið bjóðað í upprunaliga starvstilboðnum ella setanarsáttmálanum.

Uppgávurnar hjá føroyskum myndugleikum undir verandi skipan eru sostatt avmarkaðar til at hjálpa donskum myndugleikum við at lýsa nøkur faktisk viðurskifti í Føroyum, meðan avgerðarheimildin er hjá donskum myndugleikum.

Hugtakið arbeiðsmál fevnir eisini um ítróttafólk, læknar, lesandi, praktikantar, au-pair og útlendingar, sum ynskja at koma til Føroya at kunngera átrúnaðarligan boðskap. Eftir galdandi mannagongdum verður Útlendingastovan ikki biðin um at geva ummæli í málum um uppihaldsloyvi til læknar og lesandi, sum søkja fyrstu ferð. Hetta er grundað á ymisk atlit, sum snúgva seg um at gera málsviðgerðina so smidliga sum gjørligt. Í málum um útlendingar, sum kunngera ein átrúnaðarligan boðskap, heitir *Udlændingestyrelsen* ikki á Útlendingastovuna um úttalilsi. Ístaðin kannar danski útlendingamyndugleikin sjálvur, um talan er um viðurkent trúarsamfelag. Útlendingastovan og donsku útlendingamyndugleikarnir samskifta javnan um ymisk viðurskifti, sum kunnu vera við til at gera málsviðgerðina smidligari.

Umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir *lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse* (ES-skipanin) verða sum meginregla viðgjørdar, uttan at Útlendingastovan verður hoyrd. Endamálið við hesi lóg er at gera tað lættari fyri vinnuna at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya. Lógin er bert galdandi fyri ES-borgarar og er harumframt bert galdandi, um arbeiðsloysið í Føroyum er niðan fyri 3,5% (tá er loyvt at seta í starv ófaklærda útlendska arbeiðsmegi) ella niðan fyri 6% (tá er loyvt at seta í starv faklærda arbeiðsmegi innan handverkaraøkið). Flestu loyvi, ið verða givin eftir lógini, verða givin umsøkjarum, sum eru í starvi hjá undangóðkendum arbeiðsgevarum.

Seinastu 3 árini hevur verið ein støðugur vøkstur í umsóknum um uppihaldsloyvi í Føroyum. Útlendingastovan hevur fingið upplýst frá *Udlændingestyrelsen* og *SIRI*, at í 2016 vóru tilsamans 580 umsóknir, í 2017 vóru tilsamans 847 umsóknir og fram til 3. ársfjórðing 2018 vóru tilsamans 1047 umsóknir. Størsti vøksturin fevnir um loyvi, ið eru játtað sambært ES-skipanini.

Umframt at geva ummæli í málum um uppihaldsloyvi, vegleiðir Útlendingastovan borgarum í sambandi við fyrispurningar o.a. Útlendingastovan hevur somuleiðis síðani seinast í 2015 arbeitt við málsøkinum integratión, tá integratiónssamskipari varð settur í starv.

Við uppskotinum fær Útlendingastovan fullu umsitingarligu ábyrgdina í omanfyrinevndu málum. Umframt at Útlendingastovan fær øktar heimildir og førleikar á økinum, er sum heild talan um munandi øking í virkseminum hjá stovninum.

Fyri at kunna røkja uppgávuna til fulnar, er neyðugt at seta fleiri starvsfólk á Útlendingastovuni, eins og fleiri eingangsútreiðslur eru knýttar at flyting av málunum til føroyskar myndugleikar, sbr. nærri undir pkt. 2.1.

Uppskotið eigur at gera tað lættari hjá borgarunum at samskifta við myndugleikan á økinum, tá tað frameftir bert verður neyðugt at samskifta við føroyska myndugleikan í sambandi við umsóknir um uppihaldsloyvi. Harumframt er ynskiligt, at málsviðgerðartíðin verður stytt í mun til í dag. Miðal málsviðgerðartíðin hjá donsku útlendingamyndugleikunum er umleið ein til tríggjar mánaðir fyri arbeiðsmál og upp í 10 mánaðir fyri mál um familjusamanføring fyrstu ferð. Fyri umsóknir um leingjan av uppihaldsloyvi er samlaða málsviðgerðartíðin sjey mánaðir, og fyri umsóknir um tíðaróavmarkað uppihaldsoyvi er málsviðgerðartíðin í mesta lagi átta mánaðir. Fyri mál um uppihaldsloyvi til útlendingar, ið kunngera ein átrúnaðarligan boðskap, er málsviðgerðartíðin í mesta lagi seks mánaðir.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við uppskotinum verða heimildirnar at taka avgerðir í fleiri týðandi málum á útlendingaøkinum fluttar føroyskum myndugleikum. Sostatt verða tað frameftir føroyskir myndugleikar, sum taka avgerðir í málum um uppihaldsloyvi, grundað á tilknýti til familju (familjusamanføring), í málum um arbeiðsloyvi og í málum um uppihaldsoyvi til lesandi, au-pair o.o.

Mett verður, at talan er um eitt týðandi stig á leiðini móti eini fullfíggjaðari yvirtøku av málsøkinum, við tað at føroyskir myndugleikar komandi tíðina fara at byggja upp førleikan at taka avgerðir í málum á útlendingaøkinum. Eisini verður tað mett at vera ein fyrimunur fyri persónar, sum søkja um uppihaldsloyvi, at avgerðirnar frameftir verða tiknar av føroyskum myndugleikum.

Umframt at flyta umsitingarheimildirnar í ávísum útlendingamálum til Føroya er semja um, at tíðaróavmarkað uppihald í Føroyum frameftir kann treytast av, at viðkomandi útlendingur hevur eitt málsligt tilknýti til Føroyar, ella eitt tilknýti, sum á annan hátt er viðkomandi fyri integratiónina í Føroyum. Heimildin kann nýtast í sambandi við, at landsstýrið fer at veita integratiónsfremjandi tilboð við t.d. undirvísing í føroyskum soleiðis, at vantandi luttøka í slíkum tilboði av integratiónsávum kann fáa avleiðingar fyri møguleikan at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Advokatfelag Føroya, Almannamálaráðnum, Dátueftirlitinum, Føroya Landfúta, Mentamálaráðnum, Ríkisumboðnum, Samferðslumálaráðnum og Vinnuhúsinum.

Inn komu viðmerkingar frá Føroya Landfúta og frá Arbeiðsgevarafelag Føroya. Mentamálaráðið og Ríkisumboðið boðaðu frá, at tey ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ger vart við, at talan er um eitt lutfalsliga tungt umsitingarøki, og at tað hevur týdning fyri atgongdina til arbeiðsmegi hjá føroysku vinnuni, at hetta virkar væl og skjótt. Tí er tað grundleggjandi fyri hesar broytingar, sum verða skotnar upp, at neyðuga umsitingarliga orkan og neyðugu umsitingarligu førleikarnir eru til staðar, áðrenn broytingarnar verða framdar í verki.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal viðmerkja, at miðað verður ímóti at stytta málsviðgerðartíðina í teimum málum, sum nú skulu viðgerast av føroyskum myndugleikum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur saman við Útlendingastovuni mett um tørvin á fígging fyri at kunna umsita málsøkið til fulnar. Arbeitt verður nú við at fáa umsitingarligu orkuna og førleikarnar til vega, áðrenn málini verða flutt.

Føroya Landfúti hevur í sínum hoyringssvari greitt frá, at uppgávurnar og leikluturin hjá løgregluni í Føroyum eru at avgreiða ymiskar umsóknir um m.a. afturferðarloyvi, *laissez-passer* og visa, herundir schengenvisa. Tað merkir, at Føroya Politi í hesum málum tekur ímóti umsóknum, sum verða sendar *Udlændingestyrelsen*, ið hevur heimild at taka avgerðir í málunum. Føroya Politi ísetur givna loyvið tá *Udlændingestyrelsen* hevur givið loyvi til tess. Løgreglan hevur umsjón og eftirlit við uppihaldi hjá útlendingum í Føroyum. Tí er tørvur á at greina, hvussu løgregluni verður tryggjað hóskandi atgongd til møgulig yvirlit yvir avgerðir, sum verða tiknar av landsstýrinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer saman við *Udlændinge- og integrationsministeriet* at tryggja, at neyðugu mannagongdirnar eru fingnar til vega, áðrenn avgerðir á økinum verða tiknar av føroyskum myndugleikum.

Viðmerkingar frá hoyringspørtunum verða hjálagdar sum fylgiskjøl til uppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Við uppskotinum verður tað Útlendingastovan, sum fer at taka avgerðir í omanfyri nevndu málum, undir hesum í familju- og arbeiðsmálum. Útlendingastovan fær fullu umsitingarligu ábyrgdina av hesum málum, og er hetta er ein munandi øking av arbeiðsbyrðuni í mun til í dag.

Fyri at kunna røkja uppgávuna til fulnar verður mett neyðugt at seta trý fólk í starv afturat á Útlendingastovuni, sum skulu røkja uppgávur viðvíkjandi málsviðgerð, løgfrøðiligari ráðgeving og samskipan.

Fyrivarni verður tikið fyri, at tað enn verður mett um, hvør arbeiðsbyrðan hjá Útlendingastovuni verður av at veita heimferðarloyvi (*tilbagerejsetilladelser*) og laissez-passer. Hetta eru uppgávur, sum løgreglan í Føroyum í dag røkir.

Samlaða árliga hækkingin í lønarútreiðslum verður mett til 1,8 mió. kr. Hetta merkir, at árliga játtanin hjá Útlendingastovuni fer at vaksa úr kr. 3.581.000 kr. upp í kr. 5.381.000 kr.

Omaná koma útreiðslurnar, sum standast av at yvirtaka málsviðgerðina, undir hesum útreiðslur til at tillaga journalskipan og KT-skipan, flytan av málum, innbúgv, ferðing o.a. Serliga fyrstu tíðina er neyðugt at umseta og tillaga vegleiðingar og standardskriv, gera mannagongdir o.s.fr.

Tað er trupult at meta um kostnaðin av hesum útreiðslum, sum tó má roknast við at vera oman fyri 2 mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Við uppskotinum skulu føroyskir myndugleikar taka avgerðir í málum, sum higartil hava ligið hjá donskum myndugleikum. Hetta hevur við sær, at virksemið hjá Útlendingastovuni verður víðkað, sbr. omanfyri undir pkt. 2.1.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Seinastu árini hevur stórur vøkstur verið í umsóknum um uppihaldsloyvi í Føroyum. Størsti parturin eru umsóknir um arbeiðsloyvi sambært sonevndu ES-skipanini, sbr. *lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse*. Í dag verða hesi loyvi sum meginregla latin uttan ummæli frá Útlendingastovuni, og tey flestu arbeiðsloyvini verða latin umsøkjarum, ið verða settir í starv hjá arbeiðsgevarum, sum sambært lógini eru undangóðkendir at seta ES-borgarar.

Við uppskotinum verða heimildirnar at taka avgerðir viðvíkjandi m.a. arbeiðs- og uppihaldsloyvum fluttar føroyskum myndugleikum. Eitt endamál við uppskotinum er, at tað fær positivar avleiðingar fyri vinnuna, at tað er ein myndugleiki í Føroyum, sum tekur avgerðir í hesum málum. Hetta hóast materiellu reglurnar á økinum ikki broytast við uppskotinum.

Harumframt er ynskiligt, at málsviðgerðartíðin verður stytt í mun til í dag. Miðal málsviðgerðartíðin hjá donsku útlendingamyndugleikunum er umleið ein til tríggjar mánaðir fyri arbeiðsmál og upp í 10 mánaðir fyri familjumál.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Við uppskotinum liggja heimildirnar at taka avgerðir um uppihald í Føroyum hjá einum føroyskum myndugleika.

Umsóknir um uppihaldsloyvi í Føroyum, ið eru grundaðar á familjusamanføring, arbeiði, lestur og au pair-skipanina, skulu í dag latast *Udlændingestyrelsen* ella *Styrelsen for International Rekruttering og Integration*. Kærur um hesar avgerðir skulu sendast danska útlendinga- og integratiónsmálaráðnum.

Sambært uppskotinum skulu slíkar umsóknir frameftir latast føroyskum myndugleika at viðgera, og avgerðir hjá føroyska myndugleikanum skulu kærast til *Udlændingenævnet*.

Hóast materiellu reglurnar á økinum ikki broytast við uppskotinum, so verður tað mett at vera til gagns fyri teir útlendingar, ið søkja um uppihaldsloyvi í Føroyum, at avgerðirnar verða tiknar av einum myndugleika í Føroyum.

Harumframt er ynskiligt, at málsviðgerðartíðin verður stytt í mun til í dag. Miðal málsviðgerðartíðin hjá donsku útlendingamyndugleikunum er umleið ein til tríggjar mánaðir fyri arbeiðsmál og upp í 10 mánaðir fyri familjumál. Fyri umsóknir um leingjan av uppihaldsloyvi er málsviðgerðartíðin í mesta lagi sjey mánaðir, og fyri umsóknir um tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi er málsviðgerðartíðin í mesta lagi átta mánaðir. Fyri umsóknir um uppihaldsloyvi til útlendingar, ið kunngera ein átrúnaðarligan boðskap, er málsviðgerðartíðin í mesta lagi seks mánaðir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at tað eru millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum eru viðkomandi. Víst verður tó til pkt. 2.8, sum fevnir um viðkomandi tvørgangandi sáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Føroyar hava skyldu at fylgja fleiri tvørgangandi millumtjóðasáttmálum á økinum. Pkt. 5 í almennu viðmerkingunum til danska lógaruppskotið, sum er hjálagt hesum uppskoti, lýsir nakrar av teimum millumtjóða sáttmálum, sum eru viðkomandi á økinum.

1) **Hoyvíkssáttmálin**

Mett verður ikki, at Hoyvíkssáttmálin hevur týdning fyri uppskotið.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

Evropeiski mannarættindasáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*. Føroyskir myndugleikar skulu eftir delegatiónina og í sambandi við viðgerðina av málum um uppihaldsloyvi tryggja, at skyldurnar á hesum øki verða hildnar.

Í mannarættindasáttmálanum eru tað serliga grein 8 um rættin til virðing fyri familjulívi og grein 14 um forboð móti ósakligum mismuni, sum eru viðkomandi, umframt grein 2 í fjórðu ískoytisprotokoll til sáttmálan.

Sí annars pkt. 5.2-5.4 til almennu viðmerkingarnar í danska lógaruppskotinum, sum er hjálagt hesum uppskoti.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Sí pkt. 5.5. í almennu viðmerkingunum til danska lógaruppskotið, sum er hjálagt hesum uppskoti.

**2.9. Markaforðingar**

Mett verður ikki, at uppskotið elvir til markaforðingar á økinum. Uppskotið broytir ikki materiellu reglurnar á økinum, men flytur heimildirnar at taka avgerðir í ávísum útlendingamálum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Ongar ásetingar um skatt ella avgjøld eru í lógaruppskotinum.

**2.12. Gjøld**

Ongar ásetingar um gjøld eru í lógaruppskotinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Ongar nýggjar skyldur verða við uppskotinum lagdar á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskylda, skrásetingarskylda ella t.d. krøv um loyvi. Tað vera framhaldandi verandi materiellu reglurnar, sum eru galdandi fyri økið.

Uppskotið gevur tó heimild at áseta nærri reglur um, at tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum er treytað av, at viðkomandi útlendingur hevur eitt málsligt tilknýti til Føroyar, ella eitt tilknýti, sum á annan hátt er viðkomandi fyri integratiónina. Hetta skal tryggja, at integratiónin av nýkomnum útlendingum í Føroyum verður stuðlað í útlendingalógini fyri Føroyar, soleiðis at atgongdin til at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum kann verða treytað av, at útlendingurin hevur eitt sterkt tilknýti til føroyska samfelagið. Heimildin kann nýtast í sambandi við, at landsstýrið fer at veita integratiónsfremjandi tilboð við t.d. undirvísing í føroyskum, og har vantandi luttøka í slíkum tilboði av integratiónsávum – eins og í grannalondunum – eigur at fáa avleiðingar fyri møguleikan fyri at fáa tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið veitir danska ráðharranum í útlendinga- og integratiónsmálum, eftir samráðing við landsstýrið, heimild at flyta heimildir at taka avgerðir frá donskum útlendingamyndugleikum til føroyskar myndugleikar. Heimildirnar fevna um mál viðvíkjandi uppihaldi, orsakað av familjutreytaðum tilknýti til persónar, búsitandi í Føroyum, orsakað av starvsligum ella vinnuligum atlitum í Føroyum, umframt uppihaldsloyvi til lesandi, ella viðvíkjandi starvsvenjingar- ella au pair-uppihaldi í Føroyum.

Eisini veitir uppskotið danska ráðharranum í útlendinga- og integratiónsmálum, eftir samráðing við landsstýrið, heimild at áseta nærri reglur um, at tíðaróavmarkað uppihaldsloyvi í Føroyum kann verða treytað av, at viðkomandi útlendingur hevur eitt málsligt tilknýti til Føroyar, ella eitt tilknýti, sum á annan hátt er viðkomandi fyri integratiónina í Føroyum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Ongar slíkar ásetingar eru í uppskotinum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar, sum eru viðkomandi at greiða frá her.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til einstøku greinarnar til danska lógaruppskotið, sum er hjálagt hesum uppskoti.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 22. februar 2019

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Forslag til Lov om ændring af udlændingeloven (Bemyndigelse til at fastsætte integrationsrelevante krav som betingelse for tidsubegrænset opholdstilladelse på Færøerne, hjemmel til delegation af kompetence til at træffe afgørelse om ophold på Færøerne i første instans til færøske myndigheder og ændring af klageadgang i sådanne sager til Udlændingenævnet)
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Føroya Landfúta, dagfest 5. februar 2019
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Mentamálaráðnum, dagfest 1. februar 2019
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Arbeiðsgevarafelag Føroya, dagfest 5. februar 2019
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Ríkisumboðnum, dagfest 5. februar 2019